norden




## Norðurlandahúsið í Føroyum takkar fyri árið 2005

**Nógv hevur verið á skránni í árinum:**
Nýggjárskonsertin 2005, H.C. Andersen 200 ár, AME - Prix Føroyar 2005, World Story Telling Day, Vølvuspá, Altjóða Sjúkrarøktarfrøðingaráðstevna, Drottningavitjan, Summarframsýningin 2005, Summartónar 2005, Fólkatónleikarstevna, Listastevna 2005, Aurelia's Oratorio, Anne Linnet, The Poet and the Piper, Barbara Hendricks, Rúni & Susanne Brattaberg saman við Føroya Symfoniorkestri og Tarira, ANSO Ráðstevna, Úlfhamssaga, Gluggaglæma, Ljósatendring, Pipar & Salt, Handilsavtala og Mentanarráðstevna Føroyar Ísland, Føroya Landsstýri, Svend Auken, Poul Schluter, Bókmentaseminar, Ljósatendring, Løgmansskrivstovan, Ráðstevna um samspæl millum politikk og fyrisiting og Ronja Ránsmansdóttir.

**Komandi tiltøk í 2006:**
Nýggjárskonsertin 2006, Konsert við Yggdrasil, føðingardagshald hjá Williami Heinesen, Havnakórið 40 ár, Ung í Føroyum 2006, nýggj Føroysk Opera, Summartónar 2006, Fólkatónleikarastevna, Monrad & Rieslund show, Konsert við Peter Abrahamsen & Glymur, Suð og Vokalkompagniet, gestaleikur frá Det Kongelige Teater, Summarframsýning 2006, Galathea Rannsóknarferð og Ung í Norden 2006.

Meira um Norðurlandahúsið og komandi tiltøk í húsinum er á www.nlh.fo.

Norðurlandahúsið sendir eina serliga jóla- og nýggjársheilsan til arbeiðsgevarar sínar Nordisk Ministerráð og Føroya Landsstýri/Mentamálastýrið.

Norðurlandahúsið sendir somuleiðis eina jóla- og nýggjársheilsan til Tórshavnar Býráð, Runavíkar Kommunu, Kunningarstovurnar, Rithøvundafelagið, LISA, Tjóðpall Føroya, Kaggan, Jóansøkufestivalin, G-Festivalin, Mentanarhúsið í Fuglafirði, Føroyskar Danskar konsertferðir, Tórshavnar Musikkskúla, Summarfestivalin í Klaksvík, Atlantis í Klaksvík, Pakkhúsið í Vági, Tvøroyar Kommunu umframt øðrum samstarvsfelagum.

Vit ynskja Føroya fólki eini gleðilig jól og gott nýggjár.

NORDENS HUS PÅ FÆRØERNE
NORÐURLANDAHÚSIÐ



## Innovatión/ nýhugsan

Ber tað til at læra
at gerast innovativ og kreativ?
Frymilin "Innovatiónsdiamanturin"
verður settur undir sjóneyku.

**Sjónleikarhúsið í Tórshavn**
bjóðar áhugaðum á verkstovu
í døgunum 20. og 21. januar 2006.
Fríggjadagin 20. jan frá kl. 16.00 - 21.00.
Leygardagin 21. jan. frá kl. 09.00 - 17.00.
**Innovatiónscafé** fyri luttakarar letur upp kl. 21.00
leygarkvøldið í Sjónleikarhúsinum.
**Prísur 1000 kr. fyri hvønn luttakara**
**Freist fyri tilmeldan 2o. des. 2005**

**Fyrilestrahaldarar:**
**Jørn Astrup,** vinnulívs- og bankamaður
**Lisbeth Nebelong,** rithøvundur
**Kjartan Kristiansen,** menningarstjóri
**Tóroddur Poulsen,** yrkjari

**Lærarar og mennarar:**
**Bo Krüger,** serkønur í frálæru um innovatión og kreativitet
**Svend Erik Nissen,** serkønur í frálæru um nýtslu av "Innovatiónsdiamantinum"

**Havnar Sjónleikarfelag**
Gulla Øregaard, samskipari

**Sí heimasíðu www.hsjonleik.fo**

TEAM85





## PRÓVDÓMARI

Søkt verður eftir próvdómara til Koyrikortdeildina at seta skjótast gjørligt. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum eitt fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir í høvuðsheitum um:

- Fyriskipan av koyriroyndum
- Próvdøming av ástøðis og verkligum koyriroyndum
- Dagføring og tilrættisleggjan av próvtilfari
- Avgreiðsla av viðskiftafólki
- Aðrar uppgávur eftir tørvi

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við námsfrøðiligum førleika ella líknandi, sum hevur kunnleika til ferðsluástøði og biltekniska økið. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, og evni og áhuga at arbeiða sjálvstøðugt við fólki. Viðkomandi má vera fyrikomandi og kundavinaligur, og kunna taka sjálvstøðugar avgerðir í samsvari við galdandi reglur á økinum. Kunnleiki til teldu er ein fyrimunur, og koyrikort til bil ein treyt.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**

Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara á tlf. 35 04 00 ella 35 04 20. Umsóknir saman við prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. desember 2005.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, vegskatt og skrásetingargjøld.*

*Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 19 fólk.*

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

REPRO2


Sosialurin
Sosialurin
i